## Felag í søguna

Eftir 125 ár í enskum fótbólti, endaði søgan hjá felagnum, Chester City, sum í gjár fór á húsagang. Felagið skyldaði skattavaldinum 192.000 krónur, og tað gjørdist rokning, ið gjørdi enda á Chester City, sum millum annað kann breggja sær av, at Liverpool-legendan, Ian Rush, byrjaði sum spælari í felagnum.



## Skeivur sprintari

Amerikanski rennarin, Ivory Williams, sleppur ikki við til innandura HM-kappingina í frælsum ítrótti um vikuskiftið, tí ein dopingroynd avdúkaði leivdir av marihuana. Williams, sum hevur verið skjótastur í heiminum í ár á 60 metra teininum, missir amerikanska meistaraheitið og sleppur av tí sama ikki við til HM.

# Feløgini fáa sín vilja

**Hondbóltssambandið hevur nú bjóðað feløgunum til limafund um eina góða viku, har víðkan av bestu deildunum hjá kvinnum og monnum verður til viðgerðar**



Hilmar Jan Hansen

Fyri einari viku síðani hittust tilsamans eini 20 umboð fyri flestu av hondbóltsfeløgunum á fundi í ÍSF-húsinum, sum endaði við, at 11 av 14 feløgunum sendu Hondbóltssambandinum eina áheitan við ynski um at víðka bestu deildirnar hjá kvinnum og monnum, so tær í mesta lagi telja átta lið. Sum nú er, eru seks lið í bæði Sunset- og Atlantic Airways-kappingini.

– Semja er um, at hetta er eitt mál, ið feløgini áttu at taka avgerð um, og í áheitanini stendur ikki meira enn tað, at hetta ynskja feløgini. Nærri treytir fyri, hvussu deildirnar skulu víðkast, mugu viðgerast á einum limafundi, sum Hondbóltssambandið kallar inn til, segði Gunn Ellefsen, næstformaður í H71, sum stóð fyri innkallingini til fundin.

Síðani hevur Hondbóltssambandið viðgjørt áheitanina á starvsnevndarfundi, har eisini kappingarnevndin var umboðað, og burtur úr hesum er komin ein innkalling til limafund, sum settur at vera leygarmorgunin 20. mars klokkan 10. Í sambandi við fundin hevur starvsnevndin heitt á kappingarnevndina um at seta ein arbeiðsbólk at fyrireika uppskot til limafundin.

– Starvsnevndin tekur til eftirtektar støðuna hjá feløgunum, sum eru komin ásamt um at boða starvsnevndini frá, at tey vilja hava, at leisturin í Sunset- og Atlantic Airways-kappingini skal takast til viðgerðar, eitt nú at møguleiki skal vera at víðka deildina til átta lið, sigur starvsnevndin, sum sostatt hevur tikið til eftirtektar áheitanina frá feløgunum um limafund, so víðkanin kann verða viðgjørd.

### Sjey lið næsta ár

Av tí at so mong av feløgunum standa aftan fyri áheitanina, er annað ikki hugsandi, enn at tær báðar bestu hondbóltsdeildirnar komandi kappingarár verða víðkaðar úr seks upp í sjey lið.

Í øllum førum verður Atlantic Airways-deildin ikki víðkað upp í meira enn sjey lið, tí har eru ikki fleiri, ið kunnu roknast sum potentiell lið í bestu deildini. Hjá kvinnunum er møguleiki helst fyri átta liðum, um undirtøka fæst fyri tí, men tað verður helst ein av spurningunum, ið feløgini vilja umrøða væl og virðiliga á limafundinum, áðrenn nøkur endlig avgerð verður tikin um tað.

Skuldi tað óvæntaða hent, at semja ikki fekst um at umskipa Sunset- og Atlantic Airways-kappingina, verður tað hjá kvinnunum VB, sum flytur niður úr bestu deildini, meðan Kyndil flytir upp. Hjá monnunum verður so Team Klaksvík uppflytari, meðan annaðhvørt VÍF, StÍF, KÍF, Kyndil ella H71 noyðist at flyta eina deild niður.

# Risin reyk út

**Real Madrid fekk bara javnt ímóti Lyon á heimavølli, og so var henda Champions League-kappingin liðug hjá spanska stórfelagnum**



**Sætta árið á rað eydnaðist ikki spanska stórfelagnum, Real Madrid, at røkka fjórðingsfinaluna í Champions League-kappingini**



Hilmar Jan Hansen

Undan dystinum ímóti Lyon í gjárkvøldið lá alt trýstið á Real Madrid, tí franska liðið vann fyrra dystin 1-0. Og hóast Real Madrid royndi sítt besta á heimavøllinum, spurdist bert ein javnleikur burturúr.

Sostatt er spanska stórfelagið liðugt í ársins útgávu av Champions League, og syrgiligu hagtølini siga eisini sítt, tí hetta er sætta árið á rað, at Real Madrid ikki røkkur so langt sum í fjórðingsfinaluna í størstu europeisku kappingini.

Tað byrjaði annars so væl í gjárkvøldið, tí bara seks minuttir vóru farnir, tá vælupplagdi Cristiano Ronaldo skoraði trygt til 1-0, og teir 80.354 heimaáskoðararnir á Estadio Santiago Bernabéu kendu vónina kveikta av nýggjum.

Men Lyon vildi ikki geva seg, og serliga í seinna hálvleiki legði franska liðið stórt trýst á og jagstraði útjavnandi málið. Tað eydnaðist eisini, tí tá eitt korter var eftir, gjørdi Miralem Pjalic tað til 1-1 eftir eina góða sending frá svenska landsliðsspælaranum, Kim Källström, og hetta gjørdist eisini endaliga úrslitið, ið sendi Lyon víðari, tí Real Madrid megnaði ongantíð at svara aftur.

– Hetta var eitt gott kvøld. Vit høvdu trupulleikar av Real Madrid í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki vístu vit, at tað er uppiborið, at vit eru víðari, segði Lyon-venjarin, Claude Puel.

Starvsfelagi hansara í Real Madrid, Manuel Pellegrini, var mótfallin eftir dystin, hvørs úrslit neyvan ger honum støðuna tryggari í venjarasessinum.

– Evstu ábyrgdina av hesum eigi eg. Nú mugu vit so royna at vinna sponsku landskappingina. Tað verður í øllum førum avgerandi fyri, hvussu mín framtíð lagar seg, suffaði Pellegrini.